

# Samkomublaðið fyri mars/apríl 2016

KELDAN

Okkara visión er, at Keldan skal vera ein andaligur miðdepil fyri allar Føroyar








www.keldan.fo

Samkomuleiðarapar: Pauli & Jastrid Høj. Tlf. 232511 & 232510

# Orðið



**Liv í Guds nærveru!**

Gud hevur skapt okkum og kallað okkum at liva í inniligum samfelagi við Seg.
Tað er at liva í Guds nærveru.
Hann vil, at vit avspegla Hann og fylla jørðina við Hansara dýrd (1.Mós. 1,28).

Kendi kristni rithøvundurin C.S. Lewis segði einaferð hesi hesi vísdómsorð: "Gud vil ikki hava okkurt frá okkum. Hann vil hava okkum!"

Syndin kom í heimin og hevði oyðilegging við sær. Men Gud hevur við Jesusi reist okkum upp og kallað okkum at skína og broyta heimin! Hann sendi Jesus at frelsa og endurreisa menniskju og heimin.

Vit læra Jesus at kenna gjøgnum Heilaga Andan og Guds orð. Lat okkum tráa eftir Guds nærveru og liva í henni. Við hesum grundarlagi fara vit út at broyta heimin.

Í 2. Mós. Kap. 33 lesa vit um, at Gud segði við ísraelsfólk, at Hann fór ikki sjálvur at leiða tey til tað lovaða landið, tí tey høvdu syndað. Gud segði, at Hann skuldi senda eingil Sín at fara við teimum. Men hetta skapti sorg og grát. Í kapitlinum lesa vit um samskiftið millum Gud og Móses. Vers 15 ljóðar soleiðis:" Tá segði Móses við Hann: "Kemur Tú ikki sjálvur við, so lat okkum ikki fara avstað hiðani!"

Gud, kom við ella fara vit ikki! Móses vildi heldur vera í oyðimørkini saman við Harranum, enn liva í materiellari yvirflóð í tí lovaða landinum uttan Hansara nærveru!
Nærvera Guds gjørdi ísraelsfólk øðrvísi enn onnur fólk.
Í dag eigur tað eisini at vera nærvera Guds, sum eyðkennir samkomu Guds og ger hana serstaka.

Stutt eftir at Dávid var vorðin kongur, spurdi hann eftir sáttmálaørkini, ið var ein ímynd av Guds nærveru. Dávid hevði longsil eftir Gudi. Hetta lesa vit um í 1. Krøn. kap. 13-16 og 2. Sám. Kap. 6.
Í 1.Krøn. 15,28 stendur: "Alt Ísrael flutti sáttmálaørk HARRANS við fagnaðarrópum og hornblástri, við lúðrum, skáltrummum og hørpu- og sitaraleiki."

Signing Guds fylgdi við nærveruni. Dávid dansaði og var als ikki bangin at úttrykkja seg fyri Gudi! Latið okkum vera frí og leys frá mannaótti! Tað hendir nakað í okkara lívi, tá vit byrja at úttrykkja okkum fyri Gudi.
Dávid sang Gudi lovsang við t.d. hesum orðum, tá ið ørkin var komin inn í Jerusalem: "Stórleiki og dýrd eru fyri ásjón Hansara, styrki og gleði eru, har sum Hann er." (1.Krøn. 16,27).

Tá við tráa eftir Guds nærveru og byrja at liva í nærveruni, hevur hetta ávirkan á okkum sum einstaklingar, familjur/heim, samkomur, arbeiðspláss/skúlar/nærumhvørvið og alt samfelagið.

Lærisveinarnir livdu nær Jesus, og tey fyrstu kristnu livdu í Jesu nærveru gjøgnum Heilaga Andan. Nærveran gjørdi munin! Menniskju blivu frelst, umbroytt og grødd í hópatali. Vit kunnu uppliva tað sama í dag. Hetta hendir, tá ið vit geva Gudi rúm og liva í Hansara nærveru.

# Skrá fyri mars/apríl

| | | |
|---|---|---|
| Mánadagur | 21. mars kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 22. mars kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 23. mars kl. 17-20: | Kaféterian er opin |

Páskastevnna er í Oasuni í Hoyvík 24.-28. mars

| | | | |
|---|---|---|---|
| Týsdagur | 29. mars. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 30. mars. | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Leygardagur | 2. apríl | kl. 20.00: | AWAKE við lovsangstænastuni |
| Sunnudagur | 3. apríl | kl. 11.00: | Morgunmøti við lovsangstænastuni<br>Innsavnan av tíggjund og heiløgum gávum |
| | | kl. 20.00: | Sangløta (sí meira undir Lýsingar) |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 4. apríl | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 5. apríl | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 6. apríl | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Hósdagur | 7. apríl | kl. 10.30-13: | Mammukafé |
| Leygardagur | 9. apríl | kl. 20.00: | AWAKE við Høgna Johannesen<br>Evnið: Evropa og islam í dag |
| Sunnudagur | 10. apríl | kl. 11.00: | Morgunmøti við Ólavi Jacobsen |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 11. apríl | kl. 19.00: | Felags bønarmøti í Havn (fríkirkjunetverkið) |
| Týsdagur | 12. apríl | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 13. apríl | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Leygardagur | 16. apríl | kl. 20.00: | Øðrvísi AWAKE |
| Sunnudagur | 17. apríl | kl. 11.00: | Morgunmøti við Paula Høj |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 18. apríl | kl. 20.00: | Bønardagur |
| Týsdagur | 19. apríl | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 20. apríl | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| | | kl. 18.00: | Leiðarakveiking við Sam Jakobsen |
| Hósdagur | 21. apríl | kl. 10.30-13: | Mammukafé |
| Leygardagur | 23. apríl | kl. 20.00: | AWAKE við Deboru Biskopstø. Evnið: Føsta |
| Sunnudagur | 24. apríl | kl. 11.00: | Morgunmøti við Sunniva Poulsen |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 25. apríl | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 26. apríl | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 27. apríl | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Leygardagur | 30. apríl | kl. 20.00: | AWAKE við Soli Deo Gloria |
| Sunnudagur | 1. mai | kl. 11.00: | Morgunmøti við ymiskari luttøku,<br>Kaj Otto Frederiksberg<br>Innsavnan av tíggjund og heiløgum gávum |

# Lýsingar

**Páskastevnan 2016**
Páskastevnan verður í ár í Oasuni í Hoyvík. Tí verða eingi møti í Kelduni á páskum.
Latið okkum stuðla stevnuni væl! Les meira um stevnuna á www.oasan.fo

**Planetshakers í Kelduni**
Heimskendi tónleikabólkurin Planetshakers kemur til Føroya!
Konsertin verður í Kelduni í Skálafirði mikukvøldið 18. mai, og er tað Keldan,
ið samskipar vitjanina.
Sí meira á www.keldan.fo/ps

**Sangløta í Kelduni**
Sunnukvøldið 3. apríl kl 20 verður sangløta í Kelduni.Ymisk luttøka verður. M.a.
Kvartettin í Betesda, Heine Lützen, Eyðun Jacobsen og fleiri. Eisini verður felagssangur.
Tað verður ókeypis atgongd til sangløtuna, men hendan dagin, kemur út nýggj fløga við
heitinum Thanks. Hetta er ein savnsfløga og kann keypast eftir sangløtuna.
Á fløguni luttaka Blátt Gras, Kvartettin í Betesda, Svein í Prestgarði, Mark Bishop, Zamar,
Eyðun Jacobsen og Ivan Parker. Fløgan kostar 120,00 kr. og allur peningur fer óskerdur til
hjálpararbeiði m.a. á Filipsoyggjunum.
Fløgan verður ikki til keyps í sølubúðum.

**Samkomulegan 2016**
Nú verður aftur skipað fyri samkomulegu í Kelduni. Legan er løgd á hvítusunnu,
vikuskiftið 13.- 15. mai.
Legan er fyri okkum øll, og vóna vit, at undirtøkan verður eins góð og undanfarna ár.
Hugsjónin við legnuni er veking og vøkstur - at vaksa nærri Gudi og nærri at hvør øðrum,
alt meðan vekingarandin fær loyvi at birtast.
Nærri kunning um tilmelding kemur seinni, men set kross í kalendaran 13. – 15. mai,
og ver tú við til at gera vikuskiftið ógloymandi!

**Leiðarakveiking**
Farið er undir at hava leiðarakveiking. Sam Jakobsen undirvísir úr Havn.
Byrjað verður kl. 18.00 við ábiti, og síðan verður farið í lítlasal til undirvísing.
Seinasta undirvísingin í hesum umfari er 20. apríl.

## Gáva til samkomuna og samkomuvirksemið

Tíggjund/gáva til Kelduna kann flytast á kontu: 9181-1205066 og 6460-1568592
Gáva til missión kann flytast á kontu: 9181-1231369 og 6460-1568606
Gáva til útbygging kann flytast á kontu: 9181-7074346 og 6460-1568584